# Argjamenn fáa nýggja vatnleiðing



## — Hetta verður m.a. gjørt í samband við útstykkingarnar í Havnadali, sigur Hans E. Heinesen, arbeiðsformaður

Síðan fyrst í juli mánaða hava nakrir mans arbeitt við at leggja eina nýggja vatnleiðing úr nýggja vatnbrunninum við Fransá og oman til bygdina á Argjum.

Hans Esbern Heinesen, arbeiðsformaður sigur í samrøðu við Fjúrtanda, at 1,5 km av plastikkrøri eru lagdir úr vatnbrunninum og oman í bygdina. Rørini koma oman í Hagagøtu miðskeiðis á Argjum.

— Meginparturin av plastikkrørunum eru grivin niður, meðan aðrastaðni, m.a. har áir eru, er stoypt omaná, sigur Hans E. Heinesen.

Hans Esbern sigur víðari, at mesta partin av tíðini hava fáir mans luttikið í arbeiðinum, men í summarfrítíðini hava fleiri skúladreingir eisini hjálpt til við at grivið rørini niður.

### Helekoptarin flutti rørini niðan

Hans Esbern sigur, at teir leigaðu helekoptaran hjá Jógvan S. Simonsen í Fuglafirði til at flyta rørini niðan til Fransá.

— Hetta gekk heilt ómetaliga væl, og gjørdi helekoptarin arbeiðið ótrúliga skjótt.

— Vit fluttu tilsamans 21 kveylur, ið hvør er 75 metrar til longdar, niðan til Fransá. Og tað besta við helekoptaranum var, at hann eisini strekti kveylurnar fyri okkum. Hetta lætti sjálvandi munandi um arbeiðið, tí hvør kveylur vigar 307 kilo.

— Eisini fluttu vit annað tilfar niðan til nýggja vatnbrunnin. Talan er um sand, sement o.a. tilfar.

Spurdur um arbeiðið hevði verið drúgvari, um kveylurnar máttu flytast við traktori, sigur Hans Esbern:

— Eg vil ikki siga, at tað hevði verið ómøguligt, men tá hevði arbeiðið verið nógv, nógv tyngri og drúgvari.

— Fingu vit ikki helekoptaran hjá Jógvani, so høvdu vit leigað helekoptaran hjá sjóverjuni. Munur hevði tó verið á hesum, tí hann hevði helst ikki kunnað strekt okkum kveylurnar út. Og høvdu vit tá verið noyddir at gjørt hetta arbeiðið sjálvir.

At enda upplýsir Hans Esbern Heinesen, at arbeiðið við at leggja vatnleiðingina væntandi verður liðugt til heystar.

Hans Esbern Heinesen: — Tað tók helekoptaranum 4,5 min. frá tí at hann lætti sær á niðri á Argjum, og til hann hevði strekt kveylin út uppi við Fransá.

# Barnagarður gerast í Vági

## Bíðað verður eftir at býráðið útvegar grundstykki

Barnabati í Suðri arbeiðir í løtuni við ætlanunum um at gera barnagarð í Vági.

Jákup Olsen, formaður í lokalfelagnum, sigur, at tey í løtuni bert bíða eftir at Vágs Býráð skal útvega teimum eitt øki at byggja á. Tey hava tosað við býráðið, sum er positivt sinnað mótvegis tiltakinum, men enn hava tey ikki fingið svar frá býráðnum um hvar barnagarðurin skal liggja.

— Tá grundstykkið er fingið til vega frá býráðnum verður farið í holt við arbeiðið sum skjótast.

Barnagarðurin er klárur at fara til projekteringar.

### Dagrøkt fyri 60 børnum

Jákup Olsen sigur, at ætlanin er at eini 60 børn í aldrinum 0-7 ár skulu fáa dagrøktarpláss á dagstovninum, sum ætlanin er at gera í Vági.

— Tað er gjørd ein kanning av tørvinum á einum dagstovni fyri børn í sunnari helvt av Suðuroynni. Eini 90 foreldur svaraðu, at tey ynsktu at fáa børnini í dagrøkt.

### Bíða eftir tilmæli frá verkfrøðingi

Tórbjørn Benjardøgg, býráðsformaður í Vági sigur, at býráðið hevur játtað Barnabata at fáa grundstykki at gera barnagarð á, og er annars positivt sinnað mótvegis tiltakinum.

— Men tað er ein spurningur um, hvar tað er best hóskandi at leggja ein slíkan stovn.

Tórbjørn Benjardøgg sigur, at býráðið hevur fleiri grundstykkir at taka av.

Ein verkfrøðingur hevur málið undir hond í løtuni og hann skal gera eitt tilmæli til býráðið um, hvar hann skal liggja. Hesin er dani og hevur áður teknað tann nýggja skúlan í Vági.

— Eg rokni við, at tilmælið frá verkfrøðinginum kemur fyrsta dagin. So skal málið aftur fyri býráðið, sum so skal taka støðu, sigur Tórbjørn Benjardøgg.

Hann roknar við, at Barnabati um stutta tíð kann fáa eitt grundstykki ávíst.



Um ikki so langa tíð verður møguligt at fáa smábørn í dagrøkt suðri í Vági.

# Grønland fær egið flagg í 1981

## — Men «Dannebrog» skal framvegis vera tað almenna flaggið

**Tað er møguligt, at fyrsta grønlendska flaggið verður vundið á stong 1. mai í 1981, og kemur harvið at markera tvey ára dagin hjá grønlendska heimastýrinum. Ein flaggúrvalsnevnd, við Jonathan Motzfeldt sum formanni, er sett.**

Roknað verður við, at 10 tey bestu uppskotini um grønlendskt flagg verða løgd fyri landstingið á vártingsetuni í 1981. Av uppskotunum velur landstingið eitt ella tvey, sum møguliga aftur verður fólkaatkvøða um. Atkvøðugreiðslan verður helst eftir vártingsetuna.

Eftir grønlendsku heimastýrislógini hevur landstingið myndugleika at stilla fram uppskot, um eitt serstakt grønlendskt flagg, til Grønlandsmálaráðið, sum aftur sendir tað víðari til fólkatingið til góðkenningar.

«Dannebrog» verður tó framvegis tað almenna flaggið í Grønlandi.

Tað eru tó fleiri í Grønlandi, ið longu hava nýtt eitt «serstakt grønlendskt flagg». Hetta hendi m.a. í Godthaab, tá grønlendska heimastýrið hevði eitt ár á baki.

Tankin um eitt grønlendskt flagg, hevur verið frammi leingi, men lítið hevur verið gjørt við málið. Gongd kom á í málinum, tá fýra grønlendingar, Aqigssiaq Møller, Erik Hammeken, Peter F. Rosing og Finn Lynge í juli í 1973 sendu «Grønlandsposten» eitt uppskot um eitt grønlendskt flagg. Hetta flaggið stóð í Grønlandspostinum í 1973, og í byrjanini av 1974 skipaði blaðið fyri einari flaggkapping.

14 SEP TEMBER